# Sig frá!

## Ítróttur og ágangur hoyra ongastaðni heima



**Rithøvundurin, viðgerin og ráðgevin við teimum nógvu royndunum og ikki minst røddin hjá teimum misbrotnu og ágangsraktu heldur fyrilestur mánakvøldið 18. juni kl. 19-21 ÍSF-húsinum.**

- *Hvønn leiklut hevur ítróttaleiðarin, tá ið tað snýr seg um harðskap og kynsligan ágang?*
- *Hvussu skipar ítróttaleiðarin eitt sunt og trygt umhvørvi við greiðum mørkum á øllum mótum, samstundis sum allar kenslur eru í lagi?*
- *Hvussu takkla vit, tá ið onkur SIGUR FRÁ,  og ber til at siga frá við kroppinum uttan orð?*
- *Hvør er okkara skylda, og hvør skal døma?*



MARGRETE WIEDE AASLAND (f. 1955) er psykoterapeutur á „Institutt for sexologi og terapi as" í Oslo. Hon er serkøn í sexologiskum spurningum. M.a. er hon eisini útbúgvin forskúlalærari og psykiatriskt røktarfólk, og hon hevur drúgvar royndir við menniskjum í kreppu, bæði børnum, ungum og vaksnum. Kynsligur ágangur á børn hevur síðan 1988 verið starvsøki hennara. Og eisini hava broytingar í tannáringaárunum – skiftisspurningar – havt hennara stóra áhuga.

**Tiltakið er ókeypis og er fyri øll, ið fáast við og hava ábyrgd av børnum og ungum í ítróttahøpi. Øll eru hjartaliga vælkomin!**

Ítróttasamband Føroya | Hoydalsvegur 23 | FO-100 Tórshavn | Faroe Islands | Tel.: +298 312606